Vikublaðið Sosialurin



## Kirkjan verður føroysk á ólavsøku

Løgtingið samtykti í gjár, at fólkakirkjan verður føroysk á ólavsøku, og løgmaður verður ovasti myndugleiki hennara. Umboðini í mentanarnevndini hjá Tjóðveldisflokkinum høvdu skotið upp, at landsstýrismaðurin í kirkjumálum skal vera limur í Fólkakirkjuni, men hetta bleiv vrakað. Løgtingið kundi ikki góðtaka hetta, tí eitt tílíkt uppskot er í stríð við stýrisskipanarlógina. Tí bleiv við 20 atkvøðum fyri og 10 ímóti samtykt at vísa broytingaruppskotinum burtur.



## Faroe Petroleum nýtt leitiloyvi

Norska Olju- og orkumálaráði kunngjørdi í gjár, at Faroe Petroleum fekk tillutað eitt nýtt norskt leitiloyvi. Talan er um eitt 390 ferkilometra stórt øki, sum liggur á leið 10 kilometrar norðanfyri Valhall økið. Úr hesum øki eru higartil meir enn 3,5 milliardir tunnir av olju eru framleiddar. Faroe Petroleum hevur fingið loyvi í samstarvi við DNO, Ener og Lundin. Graham Stewart, stjóri á Faroe Petroleum gleðist um nýggja loyvi. - Hetta staðfestir okkara støðu sum ein týdningarmikil leikari í umráðnum, sigur hann.

# Tónleikaløta í Miðlahúsinum

**Sunnudagin 3. juni og mánadagin 4. juni verða Miðlahúsið í Vágsbotni og Leirvíkar Bátasavn karmur um tvey forvitnislig og sera áhugaverd tónleikartiltøk og hugnaløtur.**

TÍÐINDASKRIV

Systrarnar báðar, Monika Stauss Joensen, violin og Andrea Stauss Hofmann, klaver fara at spæla blandaðan tónleik, alt frá barock til virtuosar zigeunartónar eftir Corelli, Dancla, Tchaikowsky, Csoka og Sarasate.



*Famiensdrongurin Niels Jákup við urinum hann fann í mølini. Hann fer at greiða frá hesi spennandi hending í Miðlahúsinum sunnudagin.*



*Systrarnar báðar, Monika Stauss Joensen, violin og Andrea Stauss Hofmann, klaver fara at spæla blandaðan tónleik, alt frá barock til virtuosar zigeunartónar eftir Corelli, Dancla, Tchaikowsky, Csoka og Sarasate.*

### Monika og Andrea

Systrarnar Monika Stauss Joensen og Andrea Stauss Hofmann byrjaðu at spæla uppá violin og klaver sjey og átta ára gamlar. Longu fýra ár seinni bergtóku tær á "Yecklin-competition" í kamarmusikki í Zürich.

Andrea spælir sum organistur í ymiskum kirkjum, umframt at hon undirvísir í barnaskúlanum. Hvørt summar spæla tær á ymiskum støðum í Sveits. Eisini blivu tær bidnar um at seta tann musikalska karmin á einum luksushotelli á italienskum parti í Sveis og spæla konsert í víðakenda filmfestivalbýnum Brissago.

Nú verða tær so saman at hoyra í Føroyum. Báðar tónleikarløtur í Havn og Leirvík fara at vera kryddraðar við ymiskum forvitisligum

Sunnudag 3. juni kl. 16.00 í Miðlahúsinum í Vágsbotni

Hendan løtan fer at vera ógvuliga "sveisisk". Fyrst verður konsertin. Í kaffisteðginum verður møguleiki at smakka ostafondue. Aftaná steðgin fer familjan Mortensen úr Famien við Niels Jákup at greiða frá minnuligu løtuni, tá Niels Jákup fann urið, sum til síðst førdi tey á úrmessina í Basel í Sveits.

### Eisini verða myndir vístar úr Sveits.

Mánakvøldið 4. juni kl. 20.00 í Leirvíkar Bátasavni

Jógvan við Keldu, sum sjálvur hevur røtur í Leirvík, fer aftaná steðgin at hugleiga um, tá ið hann ferðaðist við Keldu í Leirvík. Eisini fer hann at greiða frá sínum túrum í Sveis. Eisini er felagssangur.

Ì steðginum í Miðlahúsinum og á Bátasavninum ber til at fáa sær ein kaffimunn og okkurt afturvið. Atgongumerki á kr. 60 fáast við dyrnar og næmingar hava fría atgongd.

Tiltakið á Bátasavninum skuldi vera leygardagin men er útsett av serligum umstøðum.

Kringvarp Føroya:

# Radius í luftina

**Summarskráin hjá Kringvarpi Føroya er byrjað, og ein av nýggju sendingunum er summarsendingin Radius, sum fer í luftina fríggjadagin 1. juni. Talan er um eina og fjølbroytta og viðkomandi sending, siga vertirnir**

ÚTVARP

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fríggjadagin 1. juni kl. 14 fer nýggja útvarpssendingin "Radius" hjá Kringvarpi Føroya í luftina. Radius er ein summarsending, sum verður týsdag til fríggjadag frá kl. 14-16. Vertir í sendingini eru: Elin í Stórustovu, Solby A. Eliasen, Fróði Løkságarð Rúni Jákupsson og Heini í Skorini.

Í sendingini verður dentur lagdur á nýggjan tónleik og tættir um tónleik. Einaferð um vikuna verður evnið "dilemma", har lurtarar fáa møguleika at senda inn spurningar viðvíkjandi tvístøðum tey eru í og onnur evni har eitt panel, mannað við fýra fólkum, viðgerð tað ávísa evnið.

Ein av tættunum er "Undir fýra eygum", har mótspælarar ella kappingarneytar kjakast um ymiskt. Talan er um lætt kjak, har plass eisini er fyri speisemi, siga vertirnir.

Sendingin Radius verður vanliga send frá studie í útvarpinum, men kann verða hvar sum helst í landinum. Sendingin kemur eisini at dekka festivalar og stevnur kring landið.




*Tríggir av vertunum í Radius f.v.: Fróði Løkságarð, Elin í Stórustovu og Solby A. Eliasen. Berg Motors hava sponsorerað Radius við einum Subaru Trebica*

*Mynd: Jens Kristian Vang*